# Politikkur viðv. persónsupplýsingum

Hesin politikkur lýsir, hvussu MARK viðgerð persónsupplýsingar í sambandi við málsviðgerð sum liður í vanliga virkinum viðv. umsiting av leigumálum.

MARK viðger einans neyðugar upplýsingar til at røkka omanfyri nevnda endamáli. Tá vit viðgera persónsupplýsingar leggja vit stóran dent á einans at viðgera upplýsingar, sum eru viðkomandi og neyðugar í mun til endamálið. Upplýsingarnar verða viðgjørdar lógliga, rímiliga og á ein gjøgnumskygdan og sakligan hátt.

## 1. Dátuábyrgdari

Sp/f Mark
Sp/f Mark Oyggjarvegur
Sp/f Mark Kongavarða
Sp/f NN Holding
Oyggjarvegur 40
100 Tórshavn
mark@mark.fo
tel. 290080

## 2. Viðgerð av persónsupplýsingum

**Viðgerð í sambandi við umsiting av leigumálum**
MARK er dátuábyrgdari, tá vit umsita leigumál. Sum dátuábyrgdari eru vit tískil varug við, at vit viðgera upplýsingar í trúnaði um okkara viðskiftafólk og leigarar. Talan er um vanligar upplýsingar. Tað kann í heilt serligum førum koma fyri, at vit viðgerða viðkvæmar persónsupplýsingar, men í útgangsstøðinum viðgera vit bara vanligar persónsupplýsingar.

Tá vit veita tænastur í sambandi við stovnan og umsiting av leigumálum, verður leigari skrásettur í KT skipan okkara. Vit brúka persónsupplýsingarnar til at samskifta við teg og til at útføra virksemið viðv. umsiting av leigumálum annars.

Í heilt serligum og einstøkum førum kann talan verða um viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum, so sum upplýsingar um heilsuviðurskifti, yrkisfelagsligt tilknýti, revsiverd viðurskifti og upplýsingar um sosial ella heilt privat viðurskifti.

Um vit fáa tørv á at nýta persónsupplýsingarnar til eitt annað endamál enn tað, sum persónsupplýsingarnar upprunaliga eru innsavnaðar til, kanna vit, um nýggja endamálið kann sameinast við upprunaliga endamálið, um møguligar avleiðingar eru við ætlaðu víðari viðgerðini (fyri skrásetta) og um ætlaða víðari viðgerðin krevur íverksetan av víðari hóskandi trygdarátøkum.

Vit kunna skrásetta um ætlaðu víðari viðgerðina og nýggja endamálið, áðrenn íverksetan av víðari viðgerðini, og har tað er neyðugt, innheinta vit frammanundan samtykki frá skrásetta.
Vit kanna, at persónsupplýsingarnar, sum vit viðgera, eru rættar og ikki eru villleiðandi, eins og vit síggja til, at persónsupplýsingarnar, sum vit viðgera, verða dagførdar javnan.

Upplýsingarnar innsavnast sum meginregla frá okkara samstarvsfelaga Waitly, sum umvegis platformin á www.waitly.dk umsitir yvirlit yvir teir persónar, sum eru áhugaðir í at fáa bjóðað leigumál frá MARK. Í øðrum førum verða upplýsingarnar ella summar upplýsingar tó innsavnaðar beinleiðis frá leigara ella áhugaða persóninum.

Ert tú leigari ella stendur tú á áhugalistanum hjá MARK, vil okkara viðgerð av persónsupplýsingum sum útgangsstøði vera grundað á **§ 8, stk.1, nr. 2**, nevniliga at vit hava gjørt eina avtalu við teg um at veita tær leigumál ella nærri samskifti um møguleikarnar at fáa bjóðað leigumál. Viðgerðin kann eisini vera neyðug sambært **§ 8, stk. 1, nr. 3** fyri at halda eina rættarliga skyldu ella **§ 8, stk. 1, nr. 4** fyri at verja altumráðandi áhugamál hjá tær. Er talan um viðkvæmar upplýsingar, er viðgerðin grundað á samtykki ella at viðgerðin er neyðug fyri, at rættarkrav kann sannast, gerast galdandi ella verjast.

Vit burturbeina persónsupplýsingar, tá vit ikki longur hava tørv á at viðgera tær. Í hesum sambandi verður atlit tikið til rættligar skyldur hjá MARK viðv. m.a bókhaldslógini.

### 3. Móttakarar

Upplýsingar sum MARK móttekur verða viðgjørdar í trúnaði. Sum útgangsstøði verða persónsupplýsingar tískil ikki víðarigivnar til 3. mann.

Sum liður í umsitingini av leigumálunum hjá MARK, kunnu upplýsingarnar verða deildar við peningastovnar, tryggingarfeløg, kommunur og myndugleikar.

Um tørvur er á atgongd til íbúðir í sambandi við umvæling ella viðlíkahald, kunnu vit deila persónsupplýsingar við handverkarar, soleiðis at handverkarar kunnu samskipa og avtala eina tíð við leigaran viðvíkjandi umvæling og/ella viðlíkahald.

Um MARK verður álagt hetta av myndugleikunum, hevur MARK skyldu at framleggja leigusáttmálar í sambandi við eitt nú samanberingarleigumál v.m.

Verður ein fastogn seld, soleiðis at MARK ikki longur skal umsita fastognina, verða viðkomandi upplýsingar um fastognina, herundir bústaðar- og leiguviðurskifti, givnar til nýggja umsitaran.

Vit flyta ikki persónsupplýsingar til viðgerð uttan fyri ES og EØS.

### 4. Tíni rættindi

Sambært dátuverndarlógini hevur tú rættindi í samband við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum.

**Rætturin til innlit:** Tú hevur rætt til at fáa innlit í tær upplýsingar, sum vit viðgera um teg. **Rætturin til rætting:** Tú hevur rætt til at fáa rangar upplýsingar um teg sjálvan rættaðar. **Rætturin til striking:** Í summum førum hevur tú rætt til at fáa upplýsingar um teg sjálvan strikaðar, áðrenn okkara ætlaðu striking.

**Rætturin til viðgerðaravmarking:** Í summum førum hevur tú rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit framyvir sum útgangsstøði bert goyma persónsupplýsingarnar.

**Rætturin til dátuflutning:** Tú hevur í summum førum rætt til at fáa tínar persónsupplýsingar útflýggjaðar í einum skipaðum, vanligum nýttum og teldutøkum sniði, og at fáa hesar persónsupplýsingar fluttar frá einum dátuábyrgdara til ein annan uttan forðing. **Rætturin til mótmæli:** Tú hevur í summum førum rætt til at mótmæla okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum.
**Rætturin til ikki at vera fyri individuellari avgerð**, sum einans er grundað á automatiska viðgerð.

Umbønin verður svarað skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at hon er móttikin. Um serstøk viðurskifti so sum nøgd og torgreidni gera, at tað er ógjørligt at svara umbønini innan 4 vikur, kann tíðarskeiðið leingjast við 8 vikum. Tú fært serstøk boð frá okkum, um freistin verður longd, og tá umbønin er svarað.

## 5. Kæra

Um tú ert ónøgd/ur við, hvussu vit viðgera tínar persónupplýsingar, og úrslitið av tíni áheitan til okkara ikki var nøktandi, kanst tú klaga til Dátueftirlitinum:

Dátueftirlitið
Teldupostur: dat@dat.fo
Reyngøta 33
FO-600 Saltangará
Tlf.: +298 309 101